# Javnstøðuætlan
## 2023-2027

Havstovan

Mars 2023

# Innihaldsyvirlit

Fororð .......... 3
Støðumeting .......... 4
Lógarverk .......... 4
Mál .......... 5
Átaksøki .......... 5
Átøk .......... 6
Tíðarætlan .......... 6
Ábyrgdarbýtið .......... 6
Fylgiskjal I .......... 7

# Fororð

Formatted: Danish

Javnstøðuætlanin hjá Havstovuni leggur fram høvuðstættir, mál og átøk til frama fyri javnstøðu millum kynini. Endamálið við ætlanini er at fáa javna luttøku av kvinnum og monnum í mun til arbeiðslívið á Havstovuni. Hetta inniber átøk til frama fyri javna umboðan av kvinnum og monnum, átøk ímóti vansum vegna kyn, javnbjóðis treytir í mun til starvsmøguleikar og átøk fyri at skapa samljóð millum familju- og arbeiðslív hjá starvsfólkunum á Havstovuni. Úrslitini frá dátuinnsavningini, málini og átøkini skulu vera liður í áhaldandi arbeiðinum hjá Havstovuni at skapa javnstøðu og margfeldi á okkara stovni.

Hendan fyrsta javnstøðuætlanin hjá Havstovuni er galdandi fyri tíðarskeiðið 2023-2027. Í apríl 2026 verður hon endurskoðað og dagførd sambært nýggjari støðumeting.

Javnstøðuætlanin er tøk hjá øllum starvsfólkum og almenninginum á føroyskum og enskum á heimasíðu okkara, **hav.fo**

# Støðumeting

Formatted: Danish

Fyri at tryggja eitt miðvíst arbeiði og haldgott eftirlit við úrslitum av verksettum átøkum er umráðandi at grunda javnstøðuætlanina á vitan og dátur. Ávísarnir niðanfyri eru grundarlagið undir okkara støðumeting, sum vegleiðir okkara javnstøðumál. Innsavnaðu dáturnar eru nýggjastu tøku dáturnar fyri tíðarskeiðið 2018 til 2022.

| **Starvsfólk uppgjørd førleikum/ábyrgd** | 2022 | | | | | 2021 | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | N= | ♀ | ♂ | %♀ | %♂ | N= | ♀ | ♂ | %♀ | %♂ |
| Starvsfólk tilsamans | 38 | 19 | 19 | 50 | 50 | 36 | 17 | 19 | 47 | 53 |
| Leiðsla | 6 | 2 | 4 | 33 | 67 | 6 | 1 | 5 | 17 | 83 |
| Frøðingar við PhD | 13 | 5 | 8 | 38 | 62 | 12 | 4 | 8 | 33 | 67 |
| Frøðingar | 8 | 5 | 3 | 63 | 38 | 7 | 5 | 2 | 71 | 29 |
| Lívfr.hjálparfólk | 12 | 6 | 6 | 50 | 50 | 12 | 6 | 6 | 50 | 50 |
| Onnur hjálparfólk | 3 | 2 | 1 | 67 | 33 | 3 | 2 | 1 | 67 | 33 |
| PhD-lesandi | 1 | 1 | 0 | 100 | 0 | 0 | 0 | 0 | | |

| **Serstakar dátur Fyri Havstovuna Javnmettar útgávur frá Havstovuni** | 2022 2020-21 | | | | | 2021 2018-19 | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | N= | ♀ | ♂ | %♀ | %♂ | N= | ♀ | ♂ | %♀ | %♂ |
| Luttøka í vísindaligum útgávum | 28.5 | 8.5 | 20 | 30 | 70 | 21 | 7.5 | 13.5 | 36 | 64 |
| Fyrsti høvundur í vísindaligum útgávum | 2.5 | 1.5 | 1 | 60 | 40 | 4 | 2 | 2 | 50 | 50 |

# Lógarverk

Formatted: Danish

Í Føroyum er lógarverk um javnstøðu og verju av minnilutabólkum, ið hevur til endamáls at beina burtur allan mismun vegna kyn, ættarslag, etniskan uppruna, húðarlit, aldur, brek, kynslig viðurskifti, tjóðskaparligan ella sosialan uppruna, politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring, yrkisfelagsligt ella annað tilknýti ella aðra støðu.

Lógarverkið, ið tekur støði í meginregluni um javnrættindi, fevnir um lógir, leiðbeiningar, rundskriv og annað regluverk, ið er galdandi fyri allar almennar stovnar, harímillum Havstovuna. *Sí Fylgiskjal I.*

Í Føroyum er eingin lóggáva viðvíkjandi javnstøðu við serligum atliti at granskingarvirksemi. Havstovan bindur seg kortini til at lúka evropeisku treytirnar á javnstøðuøkinum og at virka fyri javnrætti sum heild.

## Mál

Havstovan miðar ímóti einum familjuvinarligum arbeiðsumhvørvi í øllum sínum arbeiði, har kvinnur og menn hava somu møguleikar.

Formatted: Danish

**Við javnstøðuætlanini hevur Havstovan sett sær hesi mál:**

- Tryggja javnbjóðismøguleikar og viðferð av kvinnum/monnum í mun til arbeiði og yrkisleið
- Stuðla undirumboðaða kyninum.
- Skapa samljóð millum arbeiðs- og familjulív hjá kvinnum og monnum
- Gera møguligar umsøkjarar varugar við okkara javnstøðupolitik.
- Skapa tilvit um kynjaspurningin í øllum okkara arbeiði – eisini í lýsingum eftir starvsfólki.
- Stremba eftir javnstøðu í øllum ráðgevandi- og avgerðareindum á Havstovuni uttan at máa undan fakligum førleikum.
- Eftirkanna og menna dátugóðsku og vitanargrundarlag til frama fyri javnstøðu og margfeldi.
- Seta framsøkin og kvantativ mál fyri næstu javnstøðuætlanina (2027 til 2030) í mun til starvssetanir, varðveitslu av starvsfólki og framflutningi.
- Økja vitanina á stovninum um javnstøðuøkið og ótilvitaðan mismun, og menna stovnsmentanina við serligum denti á at fyribyrgja áleypandi atburð.
- Stuðla javnbjóðis møguleikum fyri starvssetan og framflyting.

Formatted: Danish

## Átaksøki

Við støði í støðumetingini, innsavnaðum dátum og galdandi lógarverki um javnstøðu, hevur Havstovan staðfest, at átøk til frama fyri javnstøðu eru neyðug innan hesi øki:

Formatted: Danish

- Bygnaðir, ið stuðla javnstøðuarbeiði
- Tilvitskugerð og førleikamenning
- Íkast frá áhugapørtum
- Stovnsmentan og familjupolitikkur
- Starvssetanir, úrval og framflyting
- Leiðsla og avgerðir
- Fyribyrging av kynsligari happing
- Greiningararbeiði, deilmál, ávísar, eftirlit og eftirmeting
- Eggja til betran av javnstøðuni

Formatted: Danish

# Átøk

Formatted: Danish

Fyri at røkka ásettum málum, setir Havstovan fylgjandi átøk í verk:

- Almannakunngera javnstøðuætlanina hjá stovninum á heimasíðuni
- Hava eftirlit við nøgd av umsóknum býtt á kvinnur og menn
- Taka virknan leiklut í javnstøðu-netverkum og verkstovum
- Taka kynjahagtøl við í arbeiðið fyri at skapa javnvág í øllum framløgum hjá og um Havstovuna
- Tryggja at granskingarmøguleikar eru eins fyri kvinnur og menn
- Gera starvsfólk á Havstovuni varug við javnvág millum kynini
- Gera vart við evnið á fundum á Havstovuni
- Halda áfram at savna og greina kynjadátur um PhD-lesandi, postdoc'ar og aðrar starvsbólkar á Havstovuni

# Tíðarætlan

Formatted: Danish

Hendan javnstøðuætlanin varð góðkend av leiðslubólkinum á Havstovuni 13. apríl 2023.

Úrslit av átøkum og aðrar broytingar í javnstøðumálum verður eftirmett og endurskoðað árliga t.d. í januar 2024 til og við 2027. Í apríl 2027 verður nýggj støðumeting gjørd og javnstøðuætlanin verður eftirmett, endurskoðað og dagførd til eina nýggja ætlan, sum skal galda fyri tíðarskeiðið 2027 til 2030.

# Ábyrgdarbýtið

Formatted: Danish

Ábyrgd av verkseting av átøkum: Stjóri, Marita Rasmussen

Ábyrgd av hagtølum, árligum eftirmetingum og frágreiðingum: Marita Rasmussen og Erling í Liða

# Fylgiskjal I

Føroyska lógarverkið um javnstøðu og verju móti mismuni fevnir um fylgjandi lógir, leiðbeiningar, rundskriv og regluverk:

1. **Løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn**
   - Bannar øllum mismuni vegna kyn, undantikið serligum rættindum til annað kynið, ið eru javnstøðu at frama. Lógin ásetur, at kvinnum og monnum skulu veitast eins møguleikar til útbúgving, arbeiði, yrkisliga og mentanarliga menning.
   - Bannar øllum beinleiðis og óbeinleiðis mismuni á fólki vegna kyn í sambandi við starvsseting, uppsøgn, starvsmeting, lønarflokking, starvsflyting, starvsuppflyting, farloyvi, arbeiðsumstøður og framíhjárættindi.
   - Leggur eins løn og ágóða annars fyri sama arbeiði, eins yrkis- og menningarmøguleikar til t.d. útbúgving, eykaútbúgving, umskúling, at fara á skeið ella á ein og hvønn hátt at luttaka í virksemi, ið gevur løntakarum økt starvsføri.
   - Ásetur rætt til fráveru í sambandi við viðgongu, barnsburð og eftir barnsburð uttan skerjingar í lønar- ella eftirlønaraldri.
   - Áleggur frálærutilfar til undirvísing og uppaling barna at samsvara javnstøðuhugsjónini, herundir at øll lestrar- og starvsfrálæra skal leggjast soleiðis til rættis, at bæði kynini hava eins góðan møguleika at velja millum tey tilboð, undirvísingarstovnurin veitir.
   - Áleggur øllum almennum nevndum, ráðum, umboðum og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, at verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sama er galdandi fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý/bygdaráðslimir.
   - Skipar javnstøðunevndina, sum skal:
     - Hava eftirlit við, at henda lóg verður hildin.
     - Vera ráðgevi hjá myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum.
     - Geva tilmæli í javnstøðumálum.
     - Taka ímóti og viðgera kærur frá fólki, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn.

2. **Løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan**
   - Bannar arbeiðsgevarum at siga upp løntakara, tí viðkomandi hevur sett fram krav um at nýta rættin til barsilsfarloyvi, ella annars siga upp vegna viðgongu, barnsburð ella ættleiðing.

3. **Løgtingslóg nr. 63 frá 26. mai 2011 um at banna mismuni á arbeiðs-marknaðinum orsakað av breki**
   - Bannar arbeiðsgevarum at gera mismun á starvsfólki ella umsøkjarum til størv vegna brek, veri tað jaligur ella neiligur mismunur, í sambandi við starvssetan, uppsøgn, starvsflyting, starvsuppflyting, ella viðvíkjandi lønar- og setanartreytum
   - Bannar allari tilsipan til brek, verið tað ein fyrimunur ella vansi, tá ið søkt verður eftir fólki til starv ella vinnuliga útbúgving.

4. **Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1983 um fyrisitingarlóg**
   - Bannar latan av upplýsingum til annan fyrisitingarmyndugleika um heilt privat viðurskifti hjá einstaklingum, herundir upplýsingar um ættarslag, trúgv, og húðalit, um politisk, felagsskaplig, kynslig og revsiverd viðurskifti.

Formatted: Danish

Formatted: Danish

Formatted: Danish

5. **Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógin)**
    - Bannar viðgerð av persónsupplýsingum um húðarlit, ættarslag ella etniskan uppruna, politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring ella yrkisfelagsligt tilknýti eins og viðgerð av ílegudátum, biometriskum dátum við tí endamáli eintýtt at eyðmerkja ein persón, heilsuupplýsingum, upplýsingum um kynslig viðurskifti, revsiverd viðurskifti ella upplýsingum um munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti.

6. **Leiðbeining nr. 8000 frá 15. januar 2014 um uppsøgn (til stovnar hjá landinum**)
    - Bannar ósakligum mismuni orsakað av kyni, etniskum uppruna, aldri og øðrum.

7. **Rundskriv nr. 9001 frá 26. november 2018 um lógarsmíð**
    - Áleggur kynsóheftar orðingar, tá ið tað er gjørligt.

8. **Evropiski mannarættindasáttmálin, sum í grein 14**
    - Bannar øllum mismuni vegna kyn, ættarslag, húðarlit, móðurmál, trúgv, politiska ella aðra sannføring, tjóðskaparligan ella sosialan uppruna, tilknýti til minnilutabólk, ogn ella aðra støðu.

9. **Sáttmálin um rættindi teirra, ið bera brek, sum í grein 3 ásetur meginreglur um m.a.:**
    - At banna øllum mismuni
    - Fulla og veruliga luttøku og felagsskap í samfelagnum
    - Javnbjóðis-møguleikar
    - Javnstøðu millum menn og kvinnur

**Umframt hevur Føroya Landsstýri skipað:**

10. **Demokratia, sum hevur eitt umboð:**
        - úr hvørjum flokki á Løgtingi,
        - eitt fyri Kommunufelagið,
        - eitt fyri Kvinnufelagssamskipan Føroya
        - eitt fyri Javnstøðunevndina

    **Uppgávurnar hjá Demokratia eru, at:**
    - Skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum fyri at fáa javnari kynsumboðan í politikki
    - Økja um leiklutin hjá kvinnum í politiskum avgerðum
    - Økja um talið á kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrum, so at umboðanin samsvarar á leið við umboðanina í hinum Norðurlondum.

11. **"Avtalu um virknan starvsfólkapolitikk", ið styrkir møguleikarnar hjá landsins stovnum viðvíkjandi starvsfólkapolitikki á hesum økjum:**
        - Førleikamenning
        - Eldrapolitikkur
        - Familjupolitikkur
        - Javnstøðu

Formatted: Danish

Formatted: Danish

Formatted: Danish